# Føroyingarnir eru væl fyri

**Andrew av Fløtum og Jón Rói Jacobsen skoraði, men meðan Horsens og Johan B. Hansen tykjast hava beina kós ímóti bestu deildini, so hilnaðist tað ikki so væl hjá Frem og Fremad Amager**



*Jón Rói var á blettinum og økti til 2-0, men kortini mátti Frem taka til takkar við javnleiki*

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi hjá Horsens, og Johan B. Hansen er fastur maður á liðnum. Horsens er oddalið í næstbestu deildini. Fyrstu umførini síðani vetrarsteðgin hava teir fingið fult, og harvið bendir einki á, at gongdin skal vera sum í fjør, tá ið teir fram ímóti sumrinum mistu trygga leiðslu og harvið eisini kiksaðu í uppflytingastríðnum.

Í páskafrítíðini hava teir vunnið 2-1 á heimavølli ímóti botnliðnum Dalum og 2-0 á útivølli ímóti NFA.

Hjá Frem hevur tað ikki hilnast so væl. Burturúr tveimum dystum fingu teir bara eitt stig, og tað hevði við sær, at teir duttu aftur á triðja plássið. Lykladysturin Skírisdag í Haderslev ímóti Sønderjyske varð taptur 3-2. Jón Rói Jacobsen var orsaka av skaða ikki førur fyri at spæla, og tað siga teir í Frem kendist sum ógvuliga dyggur smeitur fyri verjuspælið.

2. páskadag var Jón Rói Jacobsen aftur á liðnum. Hann økti við góðum stútara eftir horna til 2-0 í 65. minutti, og alt bendi á heimasigur í Valby. Men so klossaðu teir í tí, og Fredericia javnaði til 2-2.

Andrew av Fløtum tykist hava vunnið fast pláss millum teir fyrstu ellivu hjá Fremad Amager. Skírisdag vunnu teir 2-1 á Eysturbrúgv ímóti B93. Andrew av Fløtum spældi teir fyrstu 77 minuttirnar, og hann legði Fremad Amager framum 1-0. Hann segðist vera framúr væl upplagdur í 1. hálvleiki. Hetta var fjórða málið hjá Andrew í hesum kappingarárinum.

2. páskadag tapti Fremad Amager á heimavølli 2-1 ímóti Køge. Andrew av Fløtum var á vøllinum allar 90 minuttirnar.

Í superliguni varð ikki spælt í páskavikuni. Tað kemst av HM undankappingardystunum, sum vóru á skránni páskaaftan, og sum aftur vera á skránni í kvøld.

# Páskakapping á Giljanesi



*So er at vita, hvør skal spæla móti hvørjum í næsta dystinum*

**21. mars skipaði Miðvágs Badmintonfelag fyri páskakapping, og fór hendan fram í Ítróttarhøllini á Giljanesi**

**Úrslitið av kappingini varð hetta:**
**Yngru leikarnir**

| | |
|---|---|
| Gull | Linda Christiansen |
| | Kirstin Johannesen |
| Silvur | Elin Maria Christiansen |
| | Lea Johannesen |
| Bronsa | Jórun Gudmundsen |
| | Ása Nielsen |

**Eldru leikarnir**

| | |
|---|---|
| Gull | Jón Sigurd á Plógv |
| Silvur | Regin Johannesen |
| Bonsa | Ronja á Plógv |

Sagt veðrur annars, at felagið í vetur hevur verið ógvuliga virkið. Danskur venjari hevur tikið sær av venjingini, og ungdómur úr allari oynni hevur møtt dúgliga til venjingar. Ætlandi fer felagið at leggja enn meira fyri til komandi kappingarár. Ikki minst á kappingarøkinum, har ætlanin er at skipa fyri fleiri kappingum.

**Danska 1. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 17 | 13 | 2 | 2 | 35 | 13 | 22 | 41 |
| 2 Sønderjyske E | 17 | 11 | 3 | 3 | 47 | 20 | 27 | 36 |
| 3 Frem | 18 | 10 | 5 | 3 | 39 | 16 | 23 | 35 |
| 4 Køge | 17 | 8 | 6 | 3 | 37 | 21 | 16 | 30 |
| 5 HIK | 17 | 9 | 3 | 5 | 32 | 23 | 9 | 30 |
| 6 Fr. Amager | 17 | 7 | 6 | 4 | 28 | 17 | 11 | 27 |
| 7 Fredericia | 17 | 7 | 6 | 4 | 30 | 22 | 8 | 27 |
| 8 Vejle | 17 | 8 | 3 | 6 | 37 | 30 | 7 | 27 |
| 9 Skjold | 17 | 7 | 3 | 7 | 24 | 29 | -5 | 24 |
| 10 AB | 15 | 6 | 3 | 6 | 29 | 28 | 1 | 21 |
| 11 Brønshøj | 16 | 4 | 4 | 8 | 25 | 34 | -9 | 16 |
| 12 NFA | 16 | 4 | 3 | 9 | 29 | 40 | -11 | 15 |
| 13 Næstved | 17 | 4 | 2 | 11 | 18 | 39 | -21 | 14 |
| 14 Ølstykke | 18 | 3 | 3 | 12 | 25 | 54 | -29 | 12 |
| 15 B 93 | 17 | 2 | 5 | 10 | 28 | 46 | -18 | 11 |
| 16 Dalum | 17 | 3 | 1 | 13 | 29 | 60 | -31 | 10 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kolding FC | 17 | 12 | 0 | 5 | 32 | 21 | 11 | 36 |
| 2 Brabrand | 16 | 11 | 2 | 3 | 38 | 19 | 19 | 35 |
| 3 Jetsmark | 17 | 9 | 3 | 5 | 41 | 29 | 12 | 30 |
| 4 Holbæk | 16 | 9 | 3 | 4 | 30 | 19 | 11 | 30 |
| 5 Slagelse | 16 | 8 | 5 | 3 | 32 | 18 | 14 | 29 |
| 6 Glostrup | 15 | 9 | 2 | 4 | 35 | 25 | 10 | 29 |
| 7 Lyngby | 15 | 9 | 1 | 5 | 35 | 20 | 15 | 28 |
| 8 Næsby | 16 | 7 | 3 | 6 | 27 | 22 | 5 | 24 |
| 9 B 1909 | 17 | 5 | 5 | 7 | 14 | 22 | -8 | 20 |
| 10 Aarhus Fr. | 15 | 5 | 3 | 7 | 25 | 22 | 3 | 18 |
| 11 FC Roskilde | 15 | 6 | 0 | 9 | 18 | 28 | -10 | 18 |
| 12 B 1913 | 16 | 4 | 5 | 7 | 23 | 31 | -8 | 17 |
| 13 Hjørring | 16 | 3 | 6 | 7 | 18 | 25 | -7 | 15 |
| 14 Værløse | 16 | 4 | 1 | 11 | 19 | 48 | -29 | 13 |
| 15 Holstebro | 17 | 3 | 2 | 12 | 21 | 41 | -20 | 11 |
| 16 Kalundborg | 16 | 2 | 3 | 11 | 24 | 42 | -18 | 9 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), John Petersen (Holstebro)